ÚT AT KOYRA

## Hei›ursløn til Lupo

Í sambandi vi› útnevningina av ársins bili, fekk VW Lupo 3L vir›isløn frá Motorjournalisternes Klub Danmark, fyri at koyra 30-33 km. pr. litur av brennievni.

Kelda: Motor Magasinet

## Daewoo Rezzo útsettur

Ein n‡ggjur mini MPV, Daewoo Rezzo, i› skuldi koma á evropeiska marikna›in nú í heyst, er útsettur til í vár. Orsøkin er at koreanarnir sjálvir hava keypt so nógvar, at teir ikki hava nokk til útflutning.

Kelda: Bilen Motor & Sport

## Opel Vivaro

Opel kemur á markna›in vi› einum n‡ggjum Vivaro vøruvogni, sum er bygdur í samstarvi vi› Renault, og er sami bilur sum Renault Trafic.

Kelda: Motor Magasinet

# Skoda Fabia
# – ársins bilur í Danmark

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Vi› Skoda bleiv ta› sum í ævint‡runum, har alt endar væl. Um vit fyri umlei› tíggju árum sí›an høvdu hoyrt at Skoda var› kosin ársins bilur, hev›i ta› veri› mett sum ársins skemtisøga. Men nógv er hent sí›an tá, eitt nú bleiv Skoda Octavia ársins bilur í Danmark fyri 1997, og nú kann Skoda Fabia pr‡›a seg vi› sama heiti fyri 2001.

### Klárt á odda

Fabia vann so ruddiliga, tá útnevningin av ársins bili fyri 2001. Útnevningin bleiv gjørd av MKD, Motorjournalisternes Klub Danmark, sum hevur sta›i› fyri hesum tiltøkunum sí›an 1981. Ein dómsnevnd vi› 29 limum høvdu 18 ymiskir bilar at velja ímillum. Ta› vísti seg skjótt, at Skoda Fabia lá á odda, og bleiv tann endaligi vinnarin vi› 267 stigum, me›an Ford Mondeo bleiv nummar 2, og Opel Corsa nummar 3.

*Ársins bilur í Danmark fyri 2001*

### Stórur eftirspurningur

Fabia, i› kom á markna›in í vár, avloysir Skoda Felicia, i› var frá 1995. Felicia var avloysari fyri Skoda Favorit, sum var fyrsti Tjekkiski bilur vi› forhjólstrekk. Danski Skoda stjórin, Peter Mygind, var sera fegin um, at Fabia var› kosin til ársins bil 2001. Ta› harmar hann, at teir, vegna tann stóra eftirspurningurin, ikki hava megna› at útvega nokk av bilum.

### Classic, Comfort, Elegance

Fabia fæst í trimum útgávum, Classic, Comfort og Elegance. Bensinmotorarnir eru allir 1.4 litur, sum fáast vi› 60, 68 og 101 hk. 1.9 litur SDI dieselmotorurin hevur 68 hk. Í sambandi vi› at Skoda bleiv ársins bilur í 2001, fara vit at hyggja nærri at søguni hjá Skoda bilunum í einum av komandi bló›unum.

*Hóast eftirspurningurin er stórur, hevur Nordbil nakrar Skoda Fabia á goymslu*



ÚT AT KOYRA

# N‡ggjur Daewoo Nubira II

*Nubira II stationvognurin hevur eitt ta› størsta vi›førisrúmi› í sínum klassa*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nú hava Daewoo bilarnir veri› í Føroyum í nøkur ár, og eru rættuliga komnir inn á markna›in. Hóast Daewoo ikki er naka› heilt n‡tt bilmerki, tekur ta› tí› at innarbei›a eitt n‡tt navn. Her hava Daewoo tó gó› kort á hondum, vi› ta› at teir eru sera kappingarførir í prísi og gó›sku.

### N‡ggjur Nubira

Daewoo hava eitt stórt úrval av modellum, heilt frá tí minsta Matiz, til Lanos, mi›alklassabilin Nubira, luksusbilin Legansa og jeepin, Musso.

Daewoo Nubira er komin í n‡ggjastu útgávuni, Nubira ll, sum er ein væl útgjørdur bilur at kappast í mi›alklassanum. At síggja til er bilurin naka› broyttur vi› t.d. størri lyktum framman og aftan, eins og fleiri a›rar broytingar.

### Rúmligur bilur

Nubira ll koyrir væl, er ljó›leysur, lættur at handfara og hevur gott vegtak, vi› eini komfort, i› er á hædd vi› japanskar og evropeiskar bilar í somu støddi. 2.0 litur motorurin vi› 133 hk hevur ríkiligt av kraft, og ger eisini sítt til at bilurin ver›ur so lættur at koyra. Bilurin er rúmligur innan, og stationvognurin hevur eitt av størstu vi›førisrúmum í sínum klassa.

### Daewoo í Føroyum

Hjá P/F Esmar Simonsen hava teir avgjørt at arbei›a á sama hátt sum danski Daewoo innflytarin, vi› at skilja sundur sølu og tænastu. Me›an sølan í stóran mun ver›ur hjá Esmar Simonsen á Kambsdali, ver›a tey stóru garanti arbei›ini gjørd á Kambsdali og í Klaksvík. Anna› servicearbei›i ver›ur gjørt á vælvaldum verkstø›um runt landi›, vi› tí í huganum at vera so nær kundanum sum gjørligt. Kanningar a›rasta›ni vísa, at fólk fegin fer›ast langt fyri at keypa ein bil, men tá talan er um service, dámar teimum betur at hon er so nær bústa›num ella arbei›splássinum sum gjørligt.

### Tríggjar útgávur

Nubira ll ver›ur gjørdur í trimum útgávum, sedan, hatchback og stationcar. Bilarnir eru væl útgjørdir, serliga CDX modellini hava somu standard útger›, sum flestu bilar hava í dag, sum t.d. ABS bremsur, servost‡ring, el-rútar, eldrivin sí›uspegl vi› hita, tokulyktir í kúfangaranum framman.

Daewoo bilarnir hava 3 ára ella 100.00 km. verksmi›jugaranti, og 6 ára rustgaranti.

*Nubira II sær annarlei›is út enn forgangarin, vi› eitt nú størri lyktum framman og aftan*

DAEWOO

## Daewoo Nubira ll CDX

| | | |
|---|---|---|
| Motorurin | 2.0 litur DOHC 16V 133 hk | |
| 0-100 km/t | 10,4 sek | |
| Bensinn‡tsla | 9,1 km/l | |
| Dekkstødd | 185/65-14 | |
| Stødd og vekt | Sedan | Stationcar |
| Longd | 449,5 cm | 455,0 cm |
| Breidd | 170,0 cm | 172,0 cm |
| Hædd | 143,0 cm | 143,0 cm |
| Eginvekt | 1258 kg | 1316 kg |
| Prísur | kr.157.700,- | kr.165.700,- |
| Søluumbo› | P/F Esmar Simonsen<br>Kambsdalur<br>FO-530 Fuglafjør›ur<br>Tlf. 444405 | |